Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinir Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Skeiv tøl í samband við tiltøk mótvegis Russlandi

Spurningar:

1. Vóru tølini um vaksandi virksemi, ið løgmaður bar fram á tíðindafundi 1. juni, og sum vórðu brúkt á tingsins røðarapalli, úr kanningini, ið landsstýrið hevur latið gjørt fyri at lýsa samstarvið við russar? Um ikki, hvaðani vóru tølini so?

Viðmerkingar:

Síðan hetta landsstýrið tók við, hevur man verið í gongd við eina kanning, ið skuldi lýsa samstarvið millum Føroyar og Russland á ymsum mótum.

Kanningin hevur tikið drúgva tíð, og hevur verið sagt, at man hevur tikið ta tíð, ið krevst, tí man skal taka støðu út frá einum haldgóðum grundarlagi.

1. juni boðaði landsstýrið frá, at man ætlaði at seta ein avmarkaðan havnastongsul í verk. Orsøkin var tann, at tað var vaksandi virksemi frá russiskum fiskiskipum í Føroyum.

Síðan landsstýrið 1. juni boðaði frá, at man ætlaði seta avmarkaðan havnastongsul í verk, hevur tað víst seg, at tølini, ið man hevur grundgivið við um vaksandi virksemi, sambært Vørn hava verið skeiv. Tølini hjá Vørn siga tvørturímóti, at virksemið er minkandi.

Tá man hevur brúkt drúgva tíð at kanna øll viðurskiftir, og man síðan kemur út við skeivum tølum, so reisir tað spurningin, um hesi tølini, ið løgmaður hevur brúkt, eru úr kanningini ella ikki.

Fyri at fáa greiðu á hesum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 9. juni 2023

Beinir Johannesen